# Gluntan aftur í Føroyum

**Mikumorgunin kom norski dansibólkurin Gluntan aftur til Føroya. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið skulu teir spæla til dans, men longu í morgin skulu teir út í almennum ørindum sum ambassadørar fyri Tróndheim**

DANSTITÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



Fyri áttandu ferð er norski dansibólkurin Gluntan komin til Føroya at undirhalda. Bólkurin, sum spælir svingandi dansitónleik til tey tilkomnu, hevur verið virkin í 37 ár, og hesi árini eru komnar 35 útgávur frá bólkinum.

Nógvir av hesum sangum hava verið nógv spældir í Føroyum, og royndirnar vísa, at Gluntan kann savna nógv fólk til dans í Føroyum.

– Vit hava fleiri ferðir áður spælt í Føroyum, so tað verður spennandi at sleppa at hitta vinir og kenningar aftur. Vit hava fingið nógvar góðar vinir í Føroyum, og tað er altíð stuttligt at síggja teir aftur, sigur Dagfinn Ellefsen, sum er ein av tónleikarunum í bólkinum.

– Føroyingar eru eitt sera vinarligt fólk. Eg haldi, at nógv fólk í norðurlondum taka lívið í so álvarsamt, men føroyingar duga framvegis at hava tað stuttliga og at vera eitt sindur barnsligir við hvørt. Tað er stuttligt at sleppa at uppliva tann føroyska mentalitetin aftur, sigur Dagfinn Ellefsen.

## Almenn umboð

Gluntan kom til Føroya við Norrønu, og longu í morgin skulu teir út í almennum ørindum. Tey vórðu fyri fleiri árum síðani útnevndir ambassadørar fyri Tróndheim, og tá norski býurin er vinarbýur við Klaksvík, skulu tónleikararnir í Gluntan á vitjan í Norðoyggjum.

Teir skulu vitja Klaksvíkar býráð hósdagin, og við sær úr Tróndheimi hava teir gávur frá kommunalu myndugleikunum.

– Vit eru stoltir av at verða umboð fyri okkara bý, og tað verður eisini stuttligt at sleppa til Klaksvíkar á vitjan. Hvør veit, um vit fáa møguleikan at spæla onkran sang har, sigur Dagfinn Ellefsen.

## Tvey tiltøk

Fríggjakvøldið skulu teir gera tað, sum teir fyrst og fremst eru komnir til Føroya fyri at gera – nevniliga spæla til dans. Fyrra tiltakið við Gluntan verður í høllini í Trongisvági. Leygarkvøldið spæla teir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

– Tað eru fimm ár síðani, at vit vóru í Føroyum seinast, so vit eru sera fegnir um, at vit nú sleppa aftur til Føroya at spæla.

– Vit hava eisini fingið tveir nýggjar tónleikarar, síðani vit vóru í Føroyum seinast, og vit fegnast um, at vit nú kunnu spæla við nýggju manningini í Føroyum. Nú sleppa teir eisini at uppliva Føroyar.

## Hava úr at gera

Gluntan hevur úr at gera, hóast talan er um eina bólk við 37 árum á baki. Tað eru ikki bara føroyingar, sum fegnast um tónleikin hjá bólkinum. Eisini heima í Noregi eru teir nógv umbidnir, og teir hava fleiri enn hundrað uppgávur hvørt ár.

– Seinastu 14 árini hava vit verið í miðal 110 ferðir úti og spælt hvørt árið. Vit spæla hvørt vikuskiftið, og harafturat eru nógvar aðrar uppgávur um summarið. Vit spæla mest í Noregi, men vit eru eisini sindur í Svøríki og spæla.

Fyrr í hesum árini kom bólkurin við eini nýggjari útgávu, sum teir kalla Flaks. Tað verður millum annað tónleikur av hesi fløguni, sum teir fara at spæla.

– Men vit fara sjálvandi eisini at spæla nógvar av teimum góðu, gomlu sangunum. Og gongur alt sum ætla, so vera eisini nakrir Creedence-sangir á skránni. Teir hoyra til, tá Gluntan spælir, sigur Dagfinn.

# Gera smáleikir burtur úr ævintýrum

**Sjónleikur, sjónleikur, sjónleikur ...**

SJÓNLEIKUR
*MáF*

Eftir væleydnaða útileikin á ólavsøku og Barnasjónleikarastevnuna 25. mai 2002 hevur MÁF sett sær fyri at taka tráðin uppaftur og spinna víðari.

Evnið á sjónleikarastevnuni, sum verður í nýggja Mentanarhúsinum í Fuglafirði 20.-22. september 2002, verður at gera smáleikir burtur úr ævintýrum.

Viðrar, verða hesar leikirnir so leiktir úti á fríøkinum í Fuglafirði.

Evnið er ógvuliga viðkomandi, nú skúlarnir sambært nýggju fólkaskúlalógini eru farnir at undirvísa í drama. MÁF vónar, at lærarar, næmingar og sjónleikarar eru áhugaðir í hesum evninum.

Gist verður í skótahúsinum, har sum umstøðurnar eru góðar, bæði fyri sosialari samveru og eisini at vera í einingi.

Byrjað verður við hugnaløtu í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið 20. september kl. 20.

Fyrrapart leygardag 21. september verður verkstaðararbeiði (workshops), m.a. keyluspæl, rødd og rørsla, kropsmedvit, improvisatión.

Seinnapartin verður arbeitt við smáleikum úr ævintýrum og farið verður gongutúr í Fuglafjarðar bygd.

At enda verður veitslan, sum byrjar kl. 20 leygarkvøldið. Á veitsluni sýna fuglfirðingar brot úr “Varmakelduteitinum”

Kostnaður fyri at luttaka í sjónleikarastevnuni er 300,00 kr. Íroknað er gisting, kostur, verkstaður, gongutúrur og veitsla.

Aldursmark: 16 ár.
Tilmelding: hjá MÁF, tlf. 315624 ella maf@maf.fo í seinasta lagi 16. september 2002.

Grót:

# Nýggir bólkar á pallin

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið 31 august fara nakrir nýggir bólkar á pallin í Losjuni í Gøtu. Á hesum sinni er talan serliga um ungar tónleikarar úr Eysturoynni, so sum Sic, Spyleg, Knút Eysturstein og aðrir, eisini verður frítt jamm. Umframt hesar bólkar er eisini Krit á skránni, ið er ein meira royndur bólkur. Krit, ið júst eru komnir inn á 15 tær bestu, skuldu spæla í Losjuni fyri góðum mánaði síðani, men tann konsertin bleiv avlýst, so í staðin verður høvi at hoyra teir leygarkvøldið.

Nú styttist til Prix Føroyar kappingin aftur verður á skránni, og í tí sambandi byrja fleiri nýggir bólkar so smátt at koma undan vatnskorpuni. Til síðstu Prix Føroyar kappingina vóru ikki minni enn 48 bólkar í luttóku, og tað er ikki smávegis.

Ætlanin við konsertini leygarkvøldið er, at geva bólkunum høvið at framføra fyri fólkið, soleiðis at teir hava fleiri royndir á bakið, um teir ætla sær t.d. at luttaka í Prixnum.

Í Grót vóna teir at fleiri nýggjir bólkar koma fram í ljósið teir næstu mánaðinar, soleiðis at fleiri áhugaverdar konsertir kunna verða í væntu.

# Jonathan Freud vitjar í Føroyum

**Svensk-jødiski rithøvundurin, Jonathan Freud, vitjar í næstu viku**

ÍSRAEL
*Tíðindaskriv*

Komandi hósdag fáa Føroyar áhugaverda vitjan úr Svøríki. Tá kemur svensk-jødiski rithøvundurin, Jonathan Freud, saman við tveimum umboðum frá Israeliska Statens Turistbyrå í Stockhólmi til Føroyar.

Vitjanin er fingin ílag saman við Ísraelsfelagnum. Jonathan Freud er fyrrverandi heryvirmaður í ísraelska herinum, men fæst nú við at skriva bøkur, halda fyrilestrar og verða ferðaleiðari fyri skandinavum íð vitja Ísrael.

Hann býr vetrarhálvárið uttan fyri Jerusalem og ferðast um summarið runt í heiminum og heldur fyrilestrar um Ísrael og tann jødiska arvin, um tann støðuga samanstoytin við aðra mentan og lívsáskoðan.

Hetta hevur verið við til at myndað rithøvundan til ein serstakan og áhugaverdan persón. Hann var heiraður við Torgny Segerstedt-stipendium í 1993.

Jonathan Freud skrivar um tað ísraelska og tað jødiska, hann viðger søguna, politikkin, moralin og átrúnaðin, hann er kendur fyri sítt lætta handalag, óvæntaðu orðingar og sín skemtiliga skrivihátt.

Túsundtals svenskarar og eisini føroyingar hava havt rithøvundan sum ferðaleiðara í Ísrael, og kenna tey seg aftur í hansara skrivligu frásagnum. Tónalagið er ógvuliga serstakt.

Hann hevur síðan 1986 skrivað og givið út fýra bøkur, tær eru allar sum hann sjálvur sigur »tíbetur langt síðani útseldar«, men tann fimta bókin er á veg, meiningin er, at hon skal verða ein intellektuellur vegvísari á eini ferð til Ísrael ella eftir eina tílíka ferð.

Fyrilesturin verður á Parnassinum á Hotel Hafnia hóskvøldið tann 29 august kl. 19:00. Fundurin er almennur.





*Vilhelm Nielsen saman við soninum, Paula, abbasoninum, Vilhelmi, á Streymoyarlandinum eftir fyrsta túrin gjøgnum tunnilin. Ella, sum hann sjálvur hevði sagt, »gjøgnum fasta sambandið til meginlandið«, eitt mál, hann íðin stríddist fyri sum tingmaður fyri Vágoynna í mong ár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður:

# – Hetta er fantastiskt

**– Fasta sambandið hevur altíð havt mín stóra áhuga. Eg havi altíð viljað, at vinnulívið í Vágum skal kunna virka á jøvnum føti við vinnulívið á meginlandinum, sigur Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður í Sandavági, sum fekk ein túr gjøgnum undirsjóvartunnilin í 90 ára føðingardagsgávu**

90 ÁR
*Eirikur Lindenskov*

– Hetta er fantastiskt, tað er vist og sannheit. Á denn broyting hetta verður fyri Vágoynna.

Hetta segði Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður, í Sandavági, sum í gjár fylti 90 ár.

Fyri at heiðra Vilhelm Nielsen á degnum, hevði stjórin fyri Vágatunlinum, Dávur Reinert Hansen, boðið honum ein túr gjøgnum Vágatunnilin.

Vilhelm Nielsen varð valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Vágum í 1958, og sat hann á tingi flestu árini fram til 1980. Einamest gjørdist hann kendur fyri uppskotið um fasta sambandið um Vestmannasund — eina heingibrúgv — sum á fyrsta sinni kom fram einaferð í sekstiárunum, men sum hann legði fram á ting saman við Halldor Hansen, tingmanni fyri Javnaðarflokkin, miðskeiðis í sjeytiárunum.

– Fasta sambandið hevur altíð havt mín stóra áhuga. Eg havi altíð viljað, at vinnulívið í Vágum skal kunna virka á jøvnum føti við vinnulívið á meginlandinum, sigur Vilhelm Nielsen við Sosialin – og tí havi eg altíð trúð upp á fasta sambandið, leggur hann afturat.

Dóttirin, Sólgerð, veit at siga, at undirsjóvartunnilin er á skránni hjá Vilhelmi hvønn dag.

– Hann hevur verið sera spentur, og hann hevur fylgt væl við í bløðunum, sigur hon.

Allar tær blaðgreinar, hann hevur klipt úr bløðunum, staðfesta stóra áhugan, hann framvegis hevur fyri tunlinum.

At sleppa at koyra ígjøgnum tunnilin á níti ára degnum, heldur Vilhelm sjálvandi vera sera spennandi – og spentur er hann eisini til tunnilin um tríggjar mánaðir skal takast í brúk.

Men hann er tó bangin fyri, at hátíðarhaldið fer at fara fram á Streymoyarlandinum, og tað heldur hann vera skeivt.

Men stjórin fyri tunnilin ger skjótt av við hendan óttan.

– Hátíðarhaldið verður sjálvandi á Vágalandinum, tí tunnilin er fyri vágafólk, hóast allir føroyingar fáa gleði av honum, sigur Dávur Reinert Hansen.

Og hetta fegnast Vilhelm um.

Túrurin gjøgnum tunnilin gongur væl. Steðgað varð sum sagt á, tá vit vóru á lægsta punktinum. Tað er 105 metrar undir vatnskorpuni, miðskeiðis í sundinum – ella 987 metrar undir Slættaratindi. Síðani varð hildið fram til tunnilsmunnan Streymoyarmegin. Gott er at koyra í tunlinum, breytin er asfalterað – bara slitlagið vantar.

Komin út Streymoyarmegin heldur Vilhelm fyri:

– At eitt býtt úr Sandavági sum eg skuldi koma við uppskotinum um fast samband, tað er løgið at hugsa sær í dag.

Vilhelm er týðuliga rørdur, og abbasonurin og navnin, sum tók ímóti honum Streymoyarmegin heldur fyri, at tunnilin kanska skuldi fingið navnið »Vilhelmstunnil« – hesum plaga vit at skemta við, sigur hann.

Tað er einki dulsmál, at uppskotið hjá Vilhelmi um heingibrúnna í sjeytiárunum varð hildið at vera luftkastellir – og tað heldur Dávur Reinert Hansen vera áhugavert.

– Tað eru kanska 35 ár síðani, at uppskotið varð nevnt fyrstu ferð. Fyrst sum brúgv, síðan sum byrging, og nú hava vit koyrt ígjøgnum tunnilin, sigur hann.

Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður og vinnulívsmaður í Sandavági var sera fegin um føðingardagsgávuna frá Vágatunlinum – túrin undir sundinum.



*Vilhelm Nielsen,fyrrverandi løgtingsmaður, Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunnilin, og sonur Vilhelm, Pauli Nielsen, á lægsta punktinum í Vágatunlinum, 105 metrar undir vatnskorpuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


